# Hava nógv gott at bjóða oljufeløgunum

**OLJUMESSA** Hóast seinasta boringin á landgrunninum ikki gjørdist tað oljufundið, sum mong høvdu vónað, so heldur stjórin á Jarðfeingi kortini, at Føroyar hava nakað gott at bjóða fram á altjóða oljumessu í London í næstum.

Jan Müller

Petur Joensen er maðurin, sum skal tryggja, at altjóða oljufeløg vilja brúka hundraðtals milliónir krónur til leiting á føroyska landgrunninum. Hann hevur eina bæði torføra og krevjandi uppgávu, og hon er at sannføra altjóða oljufeløg um møguleikarnar at finna kolvetni í føroysku undirgrundini. Vit spurdu hann, um fyribils úrslitið av Anne Marie boringini er ein nóg góð vøra at hava við sær í skjáttuni at marknaðarføra landgrunnin á oljumessu í London.

– Jú, tað haldi eg tað er. Vit hava fingið nøkur positiv úrslit, og tað skal undra meg, um ikki eisini oljufeløgini, sum hava eyguni eftir føroyska økinum, ikki eisini halda tað.




*Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi, heldur Føroyar hava nógv góð øki at bjóða fram til leiting. Kortið vísir nakrar av mongu seismisku linjunum, sum skotnar eru á landgrunninum*

*Mynd Jan Müller*

### Lættari at marknaðarføra

Petur Joensen vísir á, at tað í dag er munandi lættari at marknaðarføra landgrunnin.

– Fyrr hevur tað verið so, at fyri at kunna lata eitt loyvi varð neyðugt at hava eitt útbjóðingarumfar, og áðrenn tað skuldi lógin í løgtingið, so tað er eitt stórt apparat at seta í gongd. Fyri at fáa eitt sindur meira fleksibilitet í so máta, so hevur løgtingið broytt lógina soleiðis, at feløgini til eina og hvørja tíð kunnu koma og søkja um eitt ávíst øki. Hetta ger, at tað gevur eitt sindur meira meining at fara til eina stevnu sum hesa, har vit fara at siga oljufeløgunum, hvussu áhugavert tað føroyska økið er. Um tey eru samd í hesum, so kunnu tey koma dagin eftir, um tað skal vera og søkja um eitt øki. Tey nýtast sostatt ikki at bíða til útbjóðingarumfar verður aftur um nøkur ár ella so.

Vit spurdu Petur Joensen um økini, sum ætlanin er at marknaðarføra í London, eru nøkur av teimum mest áhugaverdu á landgrunninum? Til tað sigur hann, at tey mest áhugaverdu møguliga longu eru farin, men tað fer so tíðin at vísa. Hetta eru í hvussu er øki, sum hava eitt potentiali, og tí halda teir, at tey eru verd at bjóða út.

– Tað eru tey, sum halda, at tað er uppá tíðina, at tað verða gjørd verulig fund á føroyskum øki, men metir tú, at vit framvegis hava góða tíð til tess?

– Tað er framvegis nógv, sum er vert at fara eftir í undirgrundini, hóast sjey brunnar eru boraðir. Økið er stórt, og tað er okkara sannføring, at møguleikarnir fyri at gera verulig fund eru til steðar.

### Gott tekin

Petur Joensen heldur tað vera ein góð ábending, at feløgini í Anne Marie samtakinum nú fara at brúka ta tíð, sum er neyðug fyri at kanna alt tilfarið betur. – Um einki var at fara eftir, so høvdu tey helst bara gjørt eftir eina boring skulu gera og sum tekur nakrar fáar mánaðir. Nú vilja feløgini brúka tíð og orku uppá at analysera tilfarið. Tað má vera tí, at tey síggja onkrar møguleikar her.

– Kunnu vit ímynda okkum, at hesi felgini eftir at hava analyserað tilfarið, fara at koma aftur til Jarðfeingi við eini umsókn um at bora enn ein brunn í loyvinum?

– Ja, soleingi tey ikki eru liðug at greina úrslitið, so eru møguleikarnir nógvir. Tað vil tíðin so vísa, men útgangspunktið er áhugavert.

– Statoil skal bora tveir brunnar aftrat á landgrunninum. Kunnu upplýsingarnar frá Anne Marie brunninum vera við til at stuðla uppundir tær boringarnar, nú tað skilst, at avtala er gjørd millum Statoil og ENI um at lata hvørjum øðrum upplýsingar frá teimum seinastu boringunum.

– Tað er ov tíðliga at siga nakað um tað enn. Hetta kann Statoil helst siga nakað um.

### Virkin kolvetnisskipan

– Tá vit hyggja eftir kortinum yvir Atlantsmótið, so síggja vit, at fleiri fund eru gjørd beint hinumegin markið. Vildi tað ikki verið løgið, um einki varð funnið hesumegin?

– Júst so. Vit hava enn einaferð fingið staðfest, at kolvetnisskipanin her er sera virkin, so tað skal undra meg, at fund ikki eisini verða gjørd her. Men mest umráðandi er at fáa feløgini at bora so nógv sum møguligt og so djúpt sum møguligt kanska. Vit hava so tveir brunnar á skránni, men tað er eisini virksemið hinumegin markið, sum hevur týdning fyri okkum. Tað kann eisini fáa sína ávirkan á gongdina her.

– Fara vit kanska at síggja Statoil bora djúpri enn hini feløgini?

– Tað er ikki vist. Dýpdin nýtist ikki at vera nøkur avgerandi fortreyt fyri at finna oljuna.

– Um Statoil ikki hevði boðið sær at bora hesar brunnarnar, so var eingin nýggjur brunnur á skránni. Kunnu vit ikki siga, at vit bara hava tvey skot eftir í byrsuni?

– Nei tað kunnu vit ikki. Tíðin má vísa, hvussu nógv skot fara at vera. Tað er ov tíðliga at siga nú, so vónandi fer okkurt gott at spyrjast burtur úr í London eisini. Og lat okkum so eisini síggja endaliga úrslitið av tí seinasta brunninum og teimum báðum, sum koma.

*jan@sosialurin.fo*

## Selja Føroyar á oljumessu í London

**Marknaðarføring. Jarðfeingi fer í næstum at marknaðarføra føroyska landgrunnin á altjóða oljumessu í London. Seinastu broytingarnar í løgtingslógini um leiting gera tað munandi lættari at fáa oljufeløg at koma henda vegin.**

Jan Müller

Síðani Føroya løgting fyri stuttum samtykti broyting í kolvetnislógini um sokallaða "Open door" útbjóðing á landgrunninum hava føroysku oljumyndugleikarnir á Jarðfeingi fyrireikað seg til at marknaðarføra føroyska økið til oljufeløg, sum vilja gera íløgur í leiting um okkara leiðir. Og fyrsta ítøkiliga royndin í so máta verður stóra oljuframsýningin og ráðstevnan PETEX í London í døgunum frá 23. til 25. november. Tá fara Føroyar at hava bás á messuni.

Higartil hevur bert verið møguleiki hjá oljufeløgunum at søkja um leitiloyvi á landgrunninum í sambandi við regulerar útbjóðingar. Tríggjar tílíkar hava verið síðani ár 2000. Men lógin um "Open door" letur nýggjar dyr upp fyri oljufeløgunum samtíðis sum tað ger tað lættari hjá føroysku myndugleikunum at skapa áhuga fyri at leita her. Meginreglan í hesum nýggja útbjóðingarháttinum er tann, at nú nýtist ikki ein stór og krevjandi útbjóðing fyri at kunna veita loyvi á landgrunninum. Nú kunnu oljufeløg og myndugleikarnir sínamillum gera avtalu um ávís øki og teigar á landgrunninum.

### Ítøkiligt

Tað verður Heri Ziska, sum stendur á odda fyri jarðfrøðiliga partinum á Jarðfeingi, ið fer til London at selja føroyska økið. Vit spurdu hann, hvør munurin er at fara til slíka stevnu nú eftir at loyvistreytirnar eru broyttar.

– Høvuðsmunurin er, at vit nú hava nakað ítøkiligt at bjóða fram. Fyrr tosaðu vit við stórum armbevegilsum um, hvussu áhugavert tað føroyska økið er. Men um einki útbjóðingarumfar var fyri framman, so var áhugin hjá feløgunum sera avmarkaður. Nú fara vit at tosa um einstøk leitimið, og við tað at feløgini hava møguleikan fyri at søkja um hesi leitimið, um tey meta tey verða nóg áhugaverd, so vænti eg, at áhugin eisini verður størri.

– Er hetta fyrstu ferð tit fara út at marknaðarføra landgrunnin, síðani løgtingið broytti lógina um millumumfør?

– Hetta er fyrst ferð við nýggjum tilfari, ið er framleitt serstakliga til teir møguleikar, sum liggja í "open door" reglunum, tvs. við upparbeiddum leitimiðum. "Upparbeitt leitimið" merkir, at vit hava gjørt ein part av innleiðandi arbeiðinum fyri at kortleggja øki í undirgrundini, sum kunnu hava áhuga í leitihøpi.

– Hvat vænta tit at fáa burtur úr?

– Vit arbeiða út frá eini ætlan um, at tað skal eydnast okkum at fáa feløg til at arbeiða meira aktivt við føroyska økinum, eisini millum vanlig útbjóðingarumfør, og í besta føri kemur onkur umsókn um eitthvørt øki.

– Eru ávís øki, sum tit rokna við feløg fara eftir?

– Feløg hava ymisk modellir tey arbeiða út frá, og tí vilja tey sum útgangsstøði ikki fara eftir tí sama. Tað, sum vit á Jarðfeingi gera, er at vísa á møguleikar, sum vit síggja. Í fyrsta umfari verða tað eini 2-3 leitimið.

*jan@sosialurin.fo*